

*Nevndarval var á aðalfundinum hjá Oljutinginum mikudagin. Hjørdis Gaard og Elsa Maria Holm Olsen ynkstu ikki afturval og í teirra stað vórðu vald Sússana Sørensen og Marni Jacobsen. Harumframt sita í nevndini Pauli Einarsson, Tummas Pauli Mýru og Regin Hammer*

DONGmaður á oljutingi:

# Føroyskt gass til bretska marknaðin

OLJUTINGIÐ
*Jan Müller*

Vit hava møguliga hugsað ov nógv um bara at finna olju. Gassfund á Atlantsmótinum kunnu eisini fáa stóran týdning fyri økið, nú bretski marknaðurin skjótt fer at hungra eftir gassi, og tann dagur er kanska ikki so langt vekk, at gassframleiðsla frá Atlantsmótinum tvs. økjunum millum Føroyar og Hetland, kann vera við til at metta ein stóran bretskan marknað. Hetta var ein av niðurstøðunum hjá Jan Terje Edvardsen, leitistjóra hjá danska felagnum DONG, tá hann helt fyrilestur á Oljutinginum á Hotel Føroyum mikukvøldið.

Danski serfrøðingurin vísti á, at fleiri smærri gassfund eru gjørd vestan fyri Hetland, og tað skulu bara gerast einstøk fund aftrat til, at tað loysir seg at byggja upp ein infrastruktur og harvið fara undir at taka gassið upp úr undirgrundini og selja tað til bretska marknaðin. Bretland fer komandi árini at hava tørv á at innflyta stórar nøgdir av gassi eitt nú úr Noregi, og kemur gassframleiðslan í gongd vesan fyri Hetland, so verður tað uttan iva eisini ein partur av hesum innflutningi. Frá 2008 verður stórur mangul uppá gass á bretska marknaðinum. Jan Terje Edvardsen vísti á, at bretskir myndugleikar leggja stóran dent á, at gassframleiðsla kemur í gongd vestan fyri Hetland. So ein infratrukturur tvs. at ein móttøku- og flutningsskipan til gass frá leiðunum vestan Hetland verður raðfest høgt.

DONG, sum er við í framleiðslu og leiting bæði í danska og norska partinum av Norðsjónum, hevur eisini áhugamál í bæði bretskum og føroyskum umráði. Felagið hevur sera drúgvar royndir á gassøkinum og veitir í dag gass til mong donsk húsarhald. Eftirspurningurin eftir gassi á europeiska marknaðinum fer at vaksa nógv komandi árini, og tí metir Jan Terje Edvardssen tað eisini vera rætt at fokusera uppá framtíðar gassframleiðslu vestan fyri Hetland og í hesum førinum eisini eystan fyri Føroyuar, nú tá leitingin eftir kolvetnum heldur fram.

Serfrøðingurin, sum royndi at vera varin við sínum metingum, helt tó fyri, at tað er sannlíkt at umstøðurnar at finna gass undir føroyska basaltinum eru til steðar. Nógv bendir á, at løgini vestan fyri Hetland, sum goyma gass og olju, eisini eru at finna undir føroyska basaltinum. Teir halda seg síggja hesi hóast tað enn ikki ber til at síggja nóg væl gjøgnum basaltið.

Jan Terje Edvardsen heldur, at vit eiga at læra av teimum meira enn 200 brunnunum, sum eru boraðir vestan fyri Hetland og teimum fáu við Føroyar. Hann helt, at vit eiga at síggja økið sum eina heild heldur enn bara at fokusera uppá ávísar partar av hesum stóra økinum. Vit mugu seta alt økið í eitt størri perspektiv og í tí sambandi er helst rætt at endurskoða leitingina í tí sokallaða Gullhorninum á føroyska landgrunninum. Hann helt tað vera óheppið, at oljufeløgini høvdu nærsagt yvirbjóðað hvørjum øðrum í tí loyvisøkinum, og at tað vildi verið rætt nú at fingið eina dialog við føroyskar myndugleikar um at flyta onkrar av teimum fýra brunnunum, sum eru eftir at bora í hesum økinum. Kanska inn á eitt øki við basalti.

– Vit hava gjøgnumgingið nærum alt tilfarið, sum er tøkt frá leitingini við Føroyar, og vit halda okkum við rættiliga stórari vissu kunnu siga, at góðir møguleikar eru at gera fund og enntá stór fund.



*Jan Terji Edvardsen frá DONG savnaði umleið hálvthundrað føroyingar á Hotel Føroyum mikukvøldið, har hann greiddi frá framtíðar ætlanum og vónum hjá felagnum til olju og gass á Atlantsmótinum*

*Mynd Jan Müller*



# Savna undirskriftir til Jógvan

**Musikkskúlin hevur sett ein trýmannabólk við tí endamáli at savna so nógvar undirskriftir sum gjørligt fyri at mótmæla ætlaðu sparingunum, sum Musikkskúlin er fyri. Undirskriftirnar skulu handast Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni við mentamálum**

MUSIKKSKÚLIN
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Tað er trupult at siga, hvat vit fara at uppnáa við innsavningini av undirskriftum. Men vit vænta í øllum førum at vísa á, at foreldur at børnum í Musikkskúlanum er sera ónøgd við sparingarnar, sigur Bo Isholm, stjóri á Tórshavnar Musikkskúla.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, segði í blaðnum í gjár, at hann vildi gera sítt til, at Musikkskúlin fær neyðugu játtanina.

Men Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, segði í sama blaði, at tað verða neyvan fleiri pengar at koma eftir. Hann sigur, at tað er skjótt, at alt fer á glið, um umsóknir um eykajáttanir verða gingnar á møti.

Bo Isholm, stjóri í Musikkskúlanum, sigur seg tó vóna, at tað fer at eydnast.

– Vit vóna, at allar góðar kreftir kunnu arbeiða saman, soleiðis at Musikkskúlin kann halda áfram óbroyttur. Og so mugu vit síggja, hvat reaktiónin frá politikarunum verður, sigur Bo Isholm.

Musikkskúlin hevur brúk fyri einari hálvari millión, um hann skal halda áfram í verandi líki.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, fer at taka málið upp við samgonguna á fundi týsdagin.

Men tá Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, sigur, at talan verður neyvan um eykajáttan, so má Jógvan á Lakjuni finna pening innanfyri Mentamálaráðið.

Hetta kann til dømis merkja, at sparast má á onkrum øðrum øki innan fyri málsøkið hjá Jógvani á Lakjuni. Hann segði í gjár, at kanska eru onkrir pengar at finna onkustaðni.

Klokkan fimm í gjár, hósdagin, hevði nevndin í Musikkskúlanum fund støðuna, sum er íkomin aftaná ætlaðu sparingarnar. Nevdin skuldi taka støðu til, hvat gerast kundi við sakina.

Fyribils er ætlanin at savna so nógvar undirskriftir sum gjørligt. Hesar verða handaðar Jógvani á Lakjuni týsdagin, tá fundur er í samgonguni um málið.

Tað verður mett, at 200 næmingar og 11 lærarar mugu sigast leysir av Musikkskúlanum, um sparingin stendur við.



*Vit vóna, at allar góðar kreftir kunnu arbeiða saman, soleiðis at Musikkskúlin kann halda áfram óbroyttur. Og so mugu vit síggja, hvat reaktiónin frá politikarunum verður. Tað sigur Bo Isholm, sum er stjóri á Musikkskúlanum, har ætlanin er at skerja í játtanini við hálvari millión. Hetta merkir væntandi, at 200 næmingar og 11 lærarar færri verða á Musikkskúlanum*

## Savna fólk við tivoliøkið

Fyri at savna so mong fólk sum tilber við tivoliøkið á norðoyastevnu, verður ein pallur settur upp har eisini.

Tiltøk verða so á pallinum bæði leygar- og sunnudagin. Leygardagin verður byrjað við tiltøkum fyri børnunum klokkan 18. Síðani verður tónleikur inntil klokkan 21, tá tiltøkini enda.

Sunnudagin verður tað mest gospeltónleikur, sum verður framførdur á pallinum, men tó koma Hans Michael Mittúni og Finn Johannessen at undihalda fyri børnunum eina løtu.

Av teimum, sum koma at upptraðka á pallinum, kunnu nevnast: Arnfríð og Rannvá Lützen, Trølla Pætur og omman, Silvi, tónleikarar úr Klaksvíkar Musikkskúla, Nicolina Rubeksen´s band, gospeltónleikur frá Solo Deo Gloria, Getsemane, Heðin Askham og systr-um hansara og gospel-kórið Gleði úr KFUM og K.

**- sae**

# Støðan hjá virkjunum er vánalig

Orsakað av stóra lønarvøkstrinum seinastu árini, er støðan hjá virkjunum nú sera vánalig. Lønarútreiðslurnar eru øktar nógv, uttan at framleiðslan er økt samsvarandi.

28. mei hevði ráfiskakeyparafelagið aðalfund í Vinnuhúsinum. Serliga vóru trý ting havd á lofti.

Staðfest varð, at nógv øktu lønarútreiðslurnar seinastu árini, hava gjørt, at støðan hjá virkjunum í dag er vorðin sera vánalig. Virkini megna ikki at halda tørn, og stóri lønarvøksturin liggur sum steinur oman á byrðu.

Greitt er, at verandi uppboðsøla ikki hevur fungerað optimalt, og at talan hevur verið um at seta á stovn eina nýggja uppboðsølu, sum kann tryggja føroysku virkjunum veruligan møguleika at bjóða uppá allan tann føroyska fiskin. Staðfest varð á fundinum, at virkini framvegis taka undir við uppskotinum um nýggju uppboðssøluna, og at nevndin í ráfiskakeyparafelagnum tí hevur teirra fulla stuðul til at skipa eina tílíka.

Eisini var nevndarval, og hon var øll afturvald. Tó hevur hon skipað seg øðrvísi, soleiðis, at Egil Olsen nú er nýggjur formaður, Meinhard Jacobsen heldur fram sum næstformaður, og nevndarlimir eru Petur H. Mohr, Egil Johansen og Páll Gregersen, fyrrverandi formaður.

**eys**

Ein góður kjansur

*Kall søkir skrivstovunæming*

Kundi tú hugsað tær eina skrivstovuútbúgving í einari vinnu, sum støðugt er í menning og ávirkar gerandisdagin hjá okkum øllum? So hevur tú møguleikan nú.

Hjá Kalli er eitt lærupláss leyst at søkja til setan 1. august 2004.

Vit kunna bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi, eftir at einkarætturin er avtikin á telesamskiftisøkinum.

Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning á einum arbeiðsplássi, ið vil vaksa seg stórt í kunningarmeldrinum.

Umsøkjarar mugu hava staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans og hava FHS-, HH, students ella HF prógv.

Lærutíðin fyri næming við FHS-prógvi er 3 ár og fyri næming við HH-prógvi 2 ár, og næming við studentsprógvi 2 ár og 18 vikur.

Byrjanarlønin fyri næming við 3 ára lærutíð er kr. 8.922,22 og fyri næming við 2 ára lærutíð kr. 9.814,44.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 10. juni 2004. Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.



Endamálið hjá Kalli er at vera mest nýskapandi á føroyska marknaðinum og altið veita ta bestu tænastuna fyri ein góðan prís.

kall
Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo
Orðið er títt